SSP

Foreldur knýta bond

Foreldrafundur í yngru deild

Vit bjóða tykkum á ein felags foreldrafund **týsdagin 2. november 2021 kl. 19.00-21.00 í skúlanum á Argjahamri,** har vit seta á stovn eitt foreldraforum um at knýta bond og skermnýtslu hjá børnunum í **Gula og Grøna stovu**.

Í einum foreldraforumi er tað upplagt hjá foreldrum at hittast og skifta orð um áskoðarnir, rammur og sosialu samveruna í flokkinum.

Óli Rubeksen, leiðari í SSP-ráðgevingini, og Súsanna í Króki, SSP-ráðgevi, leggja fyri.

Fyri at fáa innlit í støðuna og áhugamál hjá næmingunum, hitta tey teir fyrr um dagin.

Børnini hava brúk fyri, at foreldur tosa saman og tí ynskja vit, at bæði foreldrini luttaka.

Gevi flokslærarunum boð, um tit koma ella ikki.